Helge Lund fráfarandi stjóri í Statoil. Mynd: Ole Jørgen Bratland

Stjórin í Statoil hevur sagt upp - byrjar í bretskum oljufelag

Jógvan Hugo Gardar

15.10.2014 - 07:20

Oljan.fo

Aðalstjórin í Statoil, Helge Lund, hevur sagt upp, og gevst beinanvegin. Hann byrjar í bretska felagnum BG Group. Tað váttar BG Group í einum tíðindaskrivi fyri løtu síðani.

Hann hevur sagt upp sjálvur, tí hann hevur fingið tilboð um at gerast aðalstjóri í einum øðrum altjóða olju- og gassfelag, stendur at lesa á Statoil.com í morgun.

Helge Lund hevur verið stjóri í Statoil í tíggju ár. Frammanundan var hann aðalstjóri í Aker Kværner-samtakinum. Tað ferðina kom tað sum ein stórur skelkur fyri høvuðseigaran í Aker-samtakinum, Kjell Inge Røkke, at aðalstjórin segði upp. Røkke gjørdi tó skjótt av. Helge Lund fór til Statoil, og hinvegin kom Inge K. Hansen, ið var fyribilsstjóri í Statoil.

Tað kom eisini sum ein skelkur á greinaraumhvørvi í Oslo at Helge Lund nú er farin frá, og skal halda fram í bretska felagnum BG Group.

Í stjórasessin hjá Statoil hevur nevndin nú fyribils sett Eldar Sætre, meðan man leitar eftir einum avloysara fyri Lund.

Nevndarleiðarin í Statoil, Svein Rennemo, sigur í eini viðmerking at tey vilja takka Helge Lund fyri tey tíggju árini hann hevur staðið á odda fyri Statoil. Hann leggur afturat at Statoil undir leiðsluni hjá Helge Lund hevur bygt seg upp til eina fyritøku sum er væl fyri.

- Hesi tíggju árini eru merkt av betri trygd, risa altjóða vøkstri og stóran vøkstur á norska landgrunninum. Leitiúrslitini og avlopið hava verið millum tey bestu í oljuvinnuni, sigur Svein Rennemo í einum tíðindaskrivi.

Sjálvur sigur Helge Lund í eini viðmerking hann hevur sent út, at tað hevur verið spennandi at vera stjóri í Statoil í tíggju ár.

- Hetta er eitt felag við nógvum dugnaligum starvsfólkum. Eg vil takka øllum fyri samstarv og ágrýtni sum tey vísa hvønn einasta dag. Vit hava bygt upp virðir fyri eigarar og samfelag, samstundis sum vit hava styrkt um okkara støðu bæði í Noregi og altjóða, sigur Helge Lund.

- Eg kann siga nógv afturat, men tað er ein tíð fyri alt. Endurnýggjan hevur stóran týdning, bæði fyri Statoil og meg. Eftir at hava hugsa um støðuna eri eg komið til tað niðurstøðu at tíðin er komin at skifta. Eg havi hug og orku til at fara undir eitt nýtt leiðslutíðarskeið, og eg haldi at hesin møguleikin er tann rætti, sigur Helge Lund.